Arbeiðssetningur hjá bólki, sum skal viðmerkja metingar av møguleikanum at bora Suðuroyartunnil úr Skúvoy

Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum er í løtuni til viðgerðar í Løgtinginum. (Løgtingsmál 72/2024.)

Løgmaður hevur lagt uppskotið fyri Løgtingið.

Uppskotið leggur upp til, at P/F Suðuroyartunnil fær heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út undirsjóvartunnil millum Sandvík og Djúpadal norðanfyri Skarvanes, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur mælt til.

Uppskotið varð samtykt við 2. viðgerð.

Í sambandi við viðgerðina, hevur løgmaður fingið áheitan frá Fíggjarnevndini og løgtingslimum um at kanna, um tað ber til at bora undirsjóvartunnil úr Skúvoy. Í álitinum frá Fíggjarnevndini verður m.a. sagt:

"Meirilutin mælir í sambandi við prosjekteringina av atkomutunli fyri Skúvoynna til, at tað verður kannað neyvt hjá avvarðandi myndugleikum, um umhvørvis-og náttúruatlit loyva at borast kann úr Skúvoynni, soleiðis at fyritøkur, sum bjóða uppá samlaðu verkætlanina, kunnu taka støðu til, um arbeiðast skal úr Skúvoynni."

Undir tingviðgerðini vístu tinglimir á, at spurningurin um tað ber til at bora úr Skúvoy er áhugaverdur, tí tað kann viðføra, at verkætlanin kann verða liðug skjótari.

Eisini varð víst á, at boring úr Skúvoy, letur upp fyri møguleikanum at broyta linjuføringina soleiðis, at undirsjóvartunnilin kann koma upp norðanfyri Sands bygd í staðin fyri í Djúpadali norðanfyri Skarvanes.

Sambært skránni hjá Løgtinginum verður uppskotið til 3. viðgerð tann 19. mai 2025.

Løgmaður hevur í sambandi við spurningin um avleiðingarnar av at bora úr Skúvoy havt fund við P/F Suðuroyartunnilin og við Tunnilsbólkin (Jón Sigurðsson, Kristian Stórhamar og Mourits Joensen) hvør sær og saman.

Løgmansskrivstovan hevur eisini umrøtt spurningin um boring í Skúvoy við Umhvørvisstovuna.

Løgmaður hevur fingið eitt notat frá P/F Suðuroyartunlinum, sum lýsir fyritreytirnar og avleiðingarnar av at bora í Skúvoy.

P/F Suðuroyartunnilin vísir á, at tað eru nógvir váðar við ætlanini at bora úr Skúvoy og at orsakað av støddini av prosjektinum verður mælt frá at taka kjansir og velja ótryggar loysnir.

Løgmaður hevur somuleiðis umrøtt møguleikan at bora úr Skúvoy við Tunnilsbólkin.

Tunnilsbólkurin metir, at tað ber til at bora úr Skúvoy og vísir á, at neyðugt er at finna loysnir saman við entreprenørum, sum eru vanir at arbeiða við slíkum verkætlanum.

Fyri at fáa eitt úttalilsi frá øðrum (meting), hevur løgmaður heitt á ein skjóttarbeiðandi bólk, sum er settur saman av fimm fólkum, sum hava fakligar førleikar og drúgvar royndir frá ávikavíst tunnils- og havnaverkætlanum í Føroyum at gera viðmerkingar til notatið frá P/F Suðuroyartunlinum.

Arbeiðsbólkurin er mannaður við Klæmint Eliasen, Jan Odmarsson, Kim Krett Hansen, Jákup Martin Kjeld og Eyðfinni Lenvig.

Arbeiðsbólkurin skal gera viðmerkingar til uppritið frá P/F Suðuroyartunlinum um fyritreytir fyri og avleiðingar av at bora undirsjóvartunnil úr Skúvoynni.

Sum part av arbeiðinum skal arbeiðsbólkurin eisini geva Tunnilsbólkinum møguleika at føra síni sjónarmið fram.

Viðmerkingarnar verða latnar løgmanni í seinasta lagi 14. mai 2025.